## Mirjam um Liverpool FC

Eg haldi við Liverpool, og eg fylgi væl við teimum. Eg síggi næstan hvønn dyst, sum teir spæla. Nú dyrka øll Fernando Torres, men mær dámar betur Steven Gerrard. Eg rokni við, at tað fer at ganga ordiliga væl hjá Liverpool næsta kappingarár. Aftaná Liverpool dámar mær Aston Villa.




## ... um tónleik

Mær dámar ymsan tónleik. Eg lurti nógv eftir tónleiki frá teknifilum- til dømis Lion King, Brother Bear og Pocahontas. Mær dámar eisini sera væl The Beatles og rockbólkin Muse, og eg lurti eisini eftir swing-tónleiki við til dømis Michael Bublé og Frank Sinatra.

# Mirjam í tænastu hjá fólkinum

**Mirjam Pætursdóttir eigur røddina, sum hvønn seinnapart gerandisdagar lesur heilsanir í Ynskiløtuni á Rás2. Henni dámar væl at taka sær av lurtaraynskjunum, men onkuntíð kemur tað fyri, at fólk ringja at skelda hana, tí tey hava fingið onkra óynskta heilsan**



*Fólk senda heilsanir umvegis teldupost, heimasíðuna hjá Rás2 ella fax, og Mirjam má við hvørt velja og vraka, tí so nógv ynski koma til sendingina, at pláss er ikki fyri øllum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Samrøða




**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo


***Til tær fimm á Farita***
*Nú mugu tit lurta. Her er heilsanin, sum tit hava saknað leingi.*
***Heilsan hin, sum einki sigur***
*Lag: Carola/ Invincible*

Dag eftir dag syrgir hon fyri, at fólkið sleppur fram at Rás2 við sínum ynskjum og heilsanum.

Mirjam Pætursdóttir er ein av kendu røddunum á Rás2. Seinastu tey árini hevur hon lisið lurtaraynski í Ynskiløtuni, sum verður send hvønn seinnapart.

- Mær dámar væl at lesa lurtaraynski og spæla sangirnar, sum fólk vilja hoyra. Hetta eru tímarnir hjá lurtarunum, og tí fáa teir júst tann tónleikin, sum teir vilja hava. Onkur heldur, at tónleikurin er keðiligur, men tað er bert ein máti at broyta tað – tað er at ynskja okkurt annað, sigur Mirjam Pætursdóttir.

Tað eru liðin tvey ár, síðani hon fyrstu ferð kom á Rás2 at starvast.

- Eg søkti eitt starv sum vertur til eina morgunsending, og eg var til samrøðu, men fekk ikki starvið. Tá Rás2 so nakað aftaná søkti eftir onkrum at taka sær av Ynskiløtuni, royndi eg aftur, og tá varð eg beinanvegin biðin um at koma til arbeiðis, greiðir Mirjam frá.

- Eg havi altíð havt áhuga fyri miðlum og kreativum arbeiði, so eg eri fegin um, at eg fekk møguleikan at starvast á Rás2. Síðani oktober í fjør havi eg arbeitt fulla tíð á Rás2, og tað hevur mær dámt sera væl, sigur hon.

***Til allar lurtarar***
*Tit mugu hava tað gott.*
***Ein, ið keðir seg***
*Lag: Busta Rhymes/Break Ya Neck*

### Ræðist ikki tøknina

Mirjam Pætursdóttir er 23 ára gomul og ættað úr Leirvík. Hon býr framvegis í Leirvík og ferðast hvønn dag millum Leirvík og Miðlahúsið í Vágsbotni, har Rás2 heldur til.

Eftir fólkaskúlan fór Mirjan í studentaskúla á Kambsdali, og har tók hon studentsprógv. Eftir tað hevur hon havt fiskaarbeiði í Leirvík og arbeitt í handli í Gøtu. Fyri tveimum árum síðani fekk hon arbeiði á Rás2 og hevur verið har síðani.

Í fjør fór Mirjam undir lesnað uttanlands, men tað var ikki akkurát nakað fyri hana, og hon kom heimaftur eftir nakrar vikur. Síðani hevur hon glett lurtarar hjá Rás2 við at spæla teirra ynski og lesa teirra heilsanir.

- Seinnapartin sendi eg Ynskiløtan, men eg fáist eisini við ymiskt annað á Rás2. Eg geri lýsingar, og mánadag sendi eg morgunsending saman við Magna Høgnesen. Tað kann verða rættiliga strævið at fáast við lýsingarnar, meðan tað er eitt sindur meira avslappandi at lesa heilsanir í Ynskiløtuni, sigur Mirjam.

Hon smæðist heldur ikki fyri at seta seg inn í tøknina á Rás2.

- Tá eg byrjaði á Rás2, skuldi eg beinanvegin læra meg at senda einsamøll. Tað var eitt sindur trupult at byrja við, men nú havi eg vant meg við tað, og tað er eingin trupulleiki at passa teknikkin, meðan eg sendi. Eg eri eisini ofta teknikkari, tá vit senda morgunsendingina mánamorgun, sigur Mirjam.

### Stórur áhugi fyri Ynskiløtuni

Lurtaraynskini til Ynskiløtuna á Rás2 verða send umvegis teldupost, heimasíðuna hjá Rás2 ella við faxi, og áðrenn sendingin fer í luftina klokkan 13 hevur Mirjam valt millum mongu ynskini og funnið sangirnar fram á telduni.

- So at siga allar dagar er fult av ynskjum, og seinna partin av vikuni koma ofta sera nógv ynski til sendingina. Eg royni sum frægast at velja burturúr, og ofta taki eg føðingardagsheilsanir ella ynski í sambandi við serligar dagar framum, sigur Mirjam Pætursdóttir.

- Tað er fleiri ferðir komið fyri, at fólk hava ringt at skelda, tí tey eru misnøgd við onkra heilsan, sum tey hava fingið. Tað er altíð onkur, sum roynir at misbrúka Ynskiløtuna við at senda ynski upp á nakkan av onkrum, men vit